# Fingu harða revsing

**Tveir ungir menn úr Napoli máttu bøta hart fyri at hava samlegu við eina unga norska gentu móti hennara vilja. Teir vórðu dømdir fyri neyðtøku, sum fór fram á Hotel Føroyum annan august í ár**

REVSING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Tveir ungir italiumenn skulu ávikavist eitt ár og tríggjar mánar, og eitt ár í fongsul fyri neyðtøku. Tað gjørdi Føroya rættur av í dag. Menninir hava biðið um tíð at umhugsa dómin.

Sanna máttu báðir unglingarnir, at »tað bøtir tú fyri í ár so mong, ið bert var ein stokkut gleði.«

Umframt longu fongsulsrevsingarnar skulu mennir gjalda gentuni 50.000 krónur í endurgjaldi innan tvær vikur. Eisini vórðu teir vístir úr Føroyum í ávikavist tíggju ár og fimm ár. Harumframt kemur so sakarmálskostnaðurin, ið teir eisini eru dømdir at gjalda. Og tann upphæddin kann lættliga gerast tað dupulta av endurgjaldsupphæddini til gentuna. Alt eftir, hvat rætturin roknar sum sakarmálskostnað.

Til dømis hevur Føroya Rættur undir sakarmálinum móti teimum báðum ungu monnunum nýtt simultantulk, sum kom úr Århus til endamálið. Eisini er unga gentan við fylgi flogin úr Noreg til Føroya við serflogfari í samband við rættarmálið. Um rætturin roknar hetta sum sakarmálskostnað, ella tað verður roknað sum vitnisútreiðslur, bar ikki greitt til at fáa at vita, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Menninir hava sitið varðhaldsfongslaðir í Føroyum síðan málið varð meldað, og teir vóru handtiknir tann 2. august. Verður úrslitið av umhugsan teirra, at teir taka við dóminum, verður hendan tíðin, teir hava sitið í geglinum, drigin frá tíðini, teir so skulu inn at sita. Eftir at rætturin hevði kunngjørt dómin, fóru teir aftur í varðhaldið at sita, meðan bíðað verður eftir, hvørja støðu teir taka.





*Teir báðir italiumenninir bóðu um tíð at umhugsa dómin. Sambært eini avtalu, sum Europaráðið hevur gjørt, kunnu teir søkja um at sleppa at sita dómin í Italia*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Kanningar stuðlaðu

Hendingin, teir báðir ialiumenninir vórðu dømdir fyri, fór fram á Hotel Føroyum tann 2. august, tá teir høvdu boðið eini 15 ára gamlari norskari gentu á eitt rúm á hotellinum. Gentan fylgdi sjálvboðin við teimum, kom greitt fram í vitnisfrágreiðingunum. Men tað, sum sagt varð um tað, ið síðan hendi inni á kamarinum, samsvaraði ikki í vitnisfrágreiðingunum hjá teimum trimum, segði dómarin.

Ungu menninir viðgingu at hava havt samlegu við gentuna. Men tað var ikki eftir teirra metan neyðtøka.

Hinvegin helt gentan uppá, at hon varð hildin í longri tíð, meðan menninir ikki færri enn fýra ferðir høvdu samlegu við hana.

Hetta uppáhald hennara varð stuðlað av »gynækologisku« kanningunum, sum gjørdar vórðu av gentuni.

Tær vístu heilt greitt tekin um ógvusliga samlegu, segði dómarin, Jørgen Petersen, tá hann las dómin upp. Skaði í undirlívinum stuðlaði undir frágreiðing hennara. Eisini varð blóð funnið á rúminum, ið samsvaraði við staðið, har gentan segði seg verða neyðtikna. Tað varð DNA kannað, og vísti hendan kanningin, at talan var um blóð frá gentuni.

Eisini segði hon seg hava klórað annan mannin í ryggin. Og merki á rygginum á manninum samsvaraði gjølla við tað, gentan greiddi frá, segði dómarin.

### Kunnu sita í Italia

Í dóminum varð dentur lagdur á, at gentan, sum brotsverkið varð framt ímóti, var so ung. Hinvegin eru menninir ikki sektaðir fyrr.

Menninir sita nú í varðhaldinum í Havn og hugsa um, hvørt teir skulu kæra dómin fyri hægri rætt.

Um teir taka við dóminum, ella teir í hægri rætti verða dømdir at sita styttri ella longri, enn Føroya Rættur hevur gjørt av, er ikki vist, at teir verða sitandi í Føroyum.

Teir verða helst í fyrsta lagi fluttir til Danmarkar og kunnu síðan verða sendir til Italia at sita restina av dóminum.

Tað ber til sambært eini avtalu, Europaráðið hevur gjørt, at søkja um at sleppa at sita dóm í egnum heimlandi.

# Aberdeen er meira enn handlar

**Ferðavinnustjórin í Aberdeen vil fegin sleppa at vísa føroyingum, at Aberdeen, og Skotland annars, er meira enn bara handlar**

FREMMANDAVITJAN
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Aberdeen er meira enn teir handlarnir, nógvir føroyingar í dag kenna býin fyri, sigur Charles Currie, ferðavinnustjóri í Aberdeen, sum í hesum døgum vitjar í Føroyum.

Hann sigur, at ferðavinnan í Aberdeen fegin vil hava fleiri føroyingar tann vegin at ferðast.

Tað er eisini meira enn sjálvur býurin Aberdeen, tey hava at vísa fram, sigur hann. Alt umráði, sum tað er, er fult av áhugaverdum støðum at vitja, Og ikki at gloyma skotska gestablídni, vísir Charles Currie á.

Hann nevnir til dømis teir góðu møguleikarnar, ið eru fyri frítíðarfiskarar í Skotlandi. Og eisini í ávísan mun heldur hann, at onnur veiða kundi latið seg gjørt. Fyri ikki at gloyma golfspælið, sum teir eru so ernir av í Skotlandi. Tað kundu saktans fleiri føroyingar lært at spælt golf upp á stutta tíð í Skotlandi, metir hann.

### Útbyggja samband

Charles Currie sigur, at hóast Føroyar eru lítlar í altjóða høpi, er tað týdningarmikið fyri eitt stað sum Aberdeen at hava beinleiðis samband hendanveg.

– Alt beinleiðis ferðasamband er týningarmikið, leggur hann dent á og fegnast um, at Atlantsflog hevur beinleiðis rutu millum Aberdeen og Føroyar. Eitt samband, ið eftr hansara meting eigur at verða útbygt. Men tað velst sjálvandi um, hvussu tað verður brúkt, ásannar hann.

Men tað nyttar einki bara við eini rutu, um fólk skulu fáast at ferðast millum londini.

– Skulu vit hava føroyingar til Aberdenen og har um leiðir at vitja, er neyðugt, at vit koma til Føroya at vísa okkum og tað, vit hava at bjóða, staðfestir ferðavinnustjórin í Aberdeen. Og tað er so tað, vit gera við hesum tiltakinum í Føroyum um dagarnar, sigur hann.

– Føroyingar kunnu læra nógv av skotum, heldur hann. Kunnleiki um okkum er farin víða. Og so nevnir hann Australia, Suðurafrika, India og annars støð um allan heim.

Aberdeen hevur tó altíð kent seg sum part av norðurheiminum. Serliga skandinavisku londunum, sigur hann. Vit hava ymiskt til felags sum eitt nú fiskivinnu. Hóast hon er dragnað nakað væl afturút í Skotlandi ásanna hann.

Men so kundi tað verið, at vit fingu oljuna til felags, heldur blaðmaðurin nakað bjartskygdur.

– Ja, til dømis, svarar skotin. Um tit finna olju.




*Borgarstjórarnir í Aberdeen og Havn vóru til staðar, tá ið skotsku dagarnir vóru settir í SMS týsdagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Mary Solveig Debes Olsen**
**ættað frá Gjógv**
**búsitandi í Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 30. september,
56 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
fríggjadagin 3. oktober kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Heri, Tórun, Súni og Jóannes**



# Arbeiðstíðin verður stytt

**Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið hava skrivað undir nýggjan sáttmála, og tað er fyri fyrstu ferð í nógv ár, at nýggjur sáttmáli er gjørdur, áðrenn tann gamli fór úr gildi**

SÁTTMÁLI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Nú er nýggjur sáttmáli gjørdur millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, og hesaferð kom tað ikki í nánd av verkfalli*

Lønin hækkar, arbeiðstíð verður stytt, og partarnir eru sinnaðir at gera eina skipan, sum kann loysa ósemjur skjótari enn áður. Tað eru nøkur at týdningarmestu pørtunum av nýggja sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, sum kom í gildi í gjár.

Lønin hækkar 2,9 prosent 1. oktober í ár, og aftur við 2,9 prosentum 1. oktober næsta ár. Eftirlønin verður 9 % og hækkar við einum prosenti um eitt ár.

Ein av stóru broytingunum í sáttmálanum er, at arbeiðstíðin minkar við trimum tímum um vikuna. Arbeiðsvikan verður ikki longur 42 tímar, men 39 tímar, og matarsteðgurin verður hálvan tíma um dagin.

### Eina fríviku afturat

Umframt styttri arbeiðsviku hevur Starvsmannafelagið nú samrátt seg til sættu frívikuna fyri sínar limir. Hendan vikan verður ikki partur av summarfrítíðini, men ein serlig frívika.

Sáttmálafrídagarnir falla burtur frá 1. januar, men nú kunnu starvsfólk vinna sær eina fríviku eyka. Avtalan er gjørd soleiðis, at fólk, sum ikki vilja hava frídagarnar, kunnu fáa teir útgoldnar ístaðin.

### Skjótari loysnir

Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið umrøddu eina broytta skipan fyri at loysa ósemjur millum partnar, og ætlanin er at gera ein serstaka avtalu um hetta áðrenn árslok.

Partarnir vilja dagføra ásetingarnar um semjing, finna aðrir trætuloysnir og hava ein skjótari gerðarrætt, sum eisini kann taka støðu til sáttmálabrot.

Í nýggja sáttmálanum er eisini gjørd semja um førleikamenning, so at starvsfólkini áhaldandi kunnu menna sínar førleikar.

### Fegin um semju

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, er væl nøgdur við nýggja sáttmálan.

– Nógv er komið burtur úr, og eg fegnist stórliga um stóra og góða úrslitið, sigur hann.

Hann heldur, at semjan um at gera ein meira munadyggan semingsstovn er stórt stig rætta vegin.

– Endar hetta við semjuni, ið tað er lagt upp til, hava báðir partar víst seg at liva upp til ábyrgdina, teir hava á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum sum heild, sigur Karsten Hansen.


## Veitst tú hvar tín tannáringur var seinastu leygarnátt ?



Almennnur fundur verður hóskvøldið 2. okt. kl. 19.30 í Skálanum
í Kommunuskúlanum í Havn.

**Skrá:**
- Erik Thorsted, danskur og norðurlendskur samskipari greiðir frá.
- Carl August Arge, formaður, greiðir frá 2 ára royndum í Havn.
- Kaffimunnur og orðaskifti.

Erik Thorsted, sum er leiðari fyri høvuðsfyrisitingini hjá Náttarravnunum í Danmark, fer á fundinum m.a. at greiða frá ætlanini at skipa eitt Norðurlendskt samstarv, sum føroysku Náttarravnarnir verða partur av. Greitt verður eisini frá náttarravnaarbeiðinum í Havn, sum nú skjótt hevur 2 ár á baki.




MØTIÐ FJØLMENT, TÍ
tín stuðul ger mun !

Sosialurin 341800



## Tilboðsferðir



### Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar

**1.995,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 29/11 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 23/10 til 8/12 2003

2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferð skal verða hósdag, fríggjadag ella leygardag. Heimferð skal verða sunnudag ella mánadag.

### Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

**2.460,-**
Íroknað ferðing fram/aftur og ferðaavgjald. Avgreiðslugjald á 220 kr. kemur aftrat prísinum.

Bílegging áðrenn 29/11 2003. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi frá 20/10 til 12/12 2003

2-15 ár minus 33%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 14 dagar.

SANSIR 355 355

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo